LØGBITI NR. 1

# STJÓRNARRÆTTARLIGA STØÐA FØROYA

LÓGARTÆNASTAN

**2. útgáva - oktober 2025**

# Løgbitar

Ætlanin við løgbitunum er stutt at lýsa nøkur yvirskipað løgfrøðilig ella faklig evni, sum tað er gott at hava sum undirstøði, tá ein lóg ella aðrar rættarreglur skulu gerast.

Løgbitarnir eru eitt leiðbeinandi ískoyti til rundskrivið um lógarsmíð.

Løgbitarnir eru gjørdir í samráð við tey stjórnarráð ella myndugleikar, sum hava serligan kunnleika innan økið, sum løgbitin viðvíkur.

Nella Festirstein
Deildarstjóri á lógartænastuni

**Løgbiti nr. 1**

# Stjórnarrættarliga støða Føroya

*Tað er væl kent, at tá ið ræður um stjórnarrættarligu støðu Føroya, eru tað fleiri – eisini ósambærilig – sjónarmið um, hvussu hon eigur at tulkast og skiljast. Í partinum um grundlógina, heimastýrislógina og stýrisskipanarlógina hava vit gjørt av at lýsa hesar lógir við at endurgeva tey sjónarmið, sum eru um hesar lógirnar í áliti um stýrisskipan Føroya frá 1994. Hetta er gjørt við tí í huga, at álitið og tey sjónarmið, sum eru í álitinum, er tað, vit kunnu siga lýsir best eina almenna føroyska støðu til stjórnarrættarligu støðu Føroya við tað, at hetta álitið er grundarlagið undir galdandi stýrisskipanarlóg og hevur eisini verið grundarlagið fyri viðgerðina av stýrisskipanarlógini á Løgtingið.*

## 1. Grundlógin [1]

Grundlóg ríkisins er lóg nr. 169 fra 5. juni 1953. Sambært § 1 er hon galdandi fyri allar partar av ríki Danmarkar og harvið eisini Føroyar. Lógin er formliga og lógliga lýst eisini at galda fyri Føroyar eftir reglunum í lóg nr. 51 fra 1. apríl 1896 om kundgørelse af love og anordninger paa Færøerne.

Ein sannroynd er eisini, at frá 1849 til í dag er hon tikin í fullum álvara og hildin uppi av teim rættarverjandi stovnunum í Føroyum, nevniliga Løgtingi, landsstýri, løgreglu, fúta, sorinskrivara, biskupi o.ø., og frælsisrættindini í henni hava eisini verið hildin uppi í Føroyum. Eisini hava danska drotningin, danska stjórnin, hernaðarvaldið og eystari landsrættur og hægstirættur nýtt sínar heimildir sambært hesi lóg til fulnar í Føroyum.

Fólkaatkvøða hevur verið um lógina í Føroyum í 1920, 1939 og 1953. Núgaldandi grundlóg ríkisins er í samsvari við fyrr galdandi grundlógir aftur til 1849 grundlógina. Tað er tí ein løgfrøðilig sannroynd, at grundlóg ríkisins má roknast at hava fult løgfrøðiligt gildi her á landi.

Tað, sum serliga hevur týdning fyri Føroyar, eru tey ávísu rættindi, sum grundlóg ríkisins veitir borgarum ríkisins, og sum lóggávuvaldið, bæði ríkismyndugleikar og heimastýrismyndugleikar, ikki kunnu skúgva til viks. Hesar reglur standa í grundlógarinnar §§ 67 og 68, §§ 70-79 og § 82. M.a. veita hesar reglur trúarfrælsi, ávísa rættartrygd undir handtøku, fongsling, húsarannsókn, rætt til at skriva uttan sensur og rætt til endurgjald undir ognartøku. Ásett er, at miðað skal verða ímóti, at hvør arbeiðsførur borgari í landinum hevur arbeiði. Almannahjálp hevur borgari eisini eftir hesum reglum krav uppá í ávísan mun umframt rætt til frían fólkaskúla.

1 - Teksturin er tikin úr Áliti um stýrisskipanarviðurskifti Føroya frá 1994, s. 48–49, og endurgevur sjónarmiðini í álitinum.

## 2. Heimastýrislógin [2]

### Grundarlagið undir skipanini

Heimastýrislógin er samtykt á Løgtingi 5. desember 1947 og staðfest og kunngjørd av amtmanninum sum Kundgørelse nr. 11 af 31. marts 1948 af lov om Færøernes Hjemmestyre í tvíteksti á føroyskum og donskum.

Í Danmark er sama lóg samtykt og staðfest av kongi og kunngjørd har sum lóg nr. 137 af 23. marts 1948 om Færøernes Hjemmestyre. Hendan lógin er ikki kunngjørd í Føroyum eftir reglunum í lóg nr. 51 af 1. april 1896 om kundgørelse af love og anordninger pa Færøerne og hevur sostatt ikki gildi í Føroyum.

Ofta hevur verið frammi í kjakinum, um heimastýrislógin kann sigast at vera innan fyri teir karmar, grundlógin setur fyri valdsbýtið í ríkinum. Ígjøgnum tíðirnar hevur dúgliga verið tjakast um, av hvørjum stýrisskipanarligum slagi heimastýrisskipanin er. Kendasta kjakið um henda spurning er millum dr.jur. Poul Meyer og Edvard Mitens, landsrættarsakførara. Dr. Meyer førir fram, at heimastýrisskipanin er ein víðfevnd delegatión av lóggávuvaldi og fyrisitingarvaldi frá ríkisdegi og kongsvaldi av teim heimildum, teir hava sambært grundlógini. Ímóti hesum førir Mitens landsrættarsakførari fram, at heimastýrislógin beinleiðis nevnir, at hin lóggevandi og fyrisitingarligi myndugleikin er hjá heimastýrinum, og at ognartøka og skattaútskriving kann fara fram sambært løgtingslóg, hóast grundlógin ásetur, at hetta bert kann fara fram sambært lóg. Lóggáva, sum heimastýrið útskrivar, má tí vera lóg í grundlógarinnar merking. Dr.jur. Alf Ross heldur í sínum stýrisskipanarlógarrætti, at heimastýrisskipanin er “en usædvanlig vidtgående delegation af lovgivningsmagt”.

Heimastýrislógin, sum er galdandi í Føroyum, er ikki ein vanlig donsk ríkislóg, við tað at lóg nr. 137 af 23. marts 1948 om Færøernes Hjemmestyre ikki er kunngjørd her á landi eftir reglunum í lóg nr. 51 af 1. april 1896 om kundgørelse af love og anordninger på Færøerne og sostatt ikki hevur gildi her á landi.

Hinvegin hevur lógin sæð dagsins ljós við bráðfeingis stýrisskipanarháttinum frá 1940 sum grundarlagi, har Løgtingið og amtmaðurin høvdu alt lóggávuvald í Føroyum. Henda stýrisskipan hevði við rættarsiðvenju grundlógarstyrki og gildi, við tað at hon veik frá tágaldandi donsku grundlógini og virkaði í heili 5 ár, uttan at nakar ivaðist í, at hon hevði fult løgfrøðiligt gildi. Í 1945 verður henda rættarsiðvenja eisini viðurkend av donsku stjórnini sambært telegrammi frá forsætismálaráðnum til amtmannin, sum var soljóðandi:

*“Regeringen takker Dem og Deres Medarbejdere for godt udført Arbejde under Adskillelsen. Regeringen godkender, at Amtmanden under Krigen sammen med Lagtinget har administreret Færøerne, og at Administrationen foreløbig videreføres paa samme maade. Haaber snart at se Dem hernede til Konference.”*

2 - Teksturin er tikin úr Áliti um stýrisskipanarviðurskifti Føroya frá 1994, s. 67–71, og endurgevur sjónarmiðini í álitinum.

Sostatt er støðan í 1948 tann, at Løgtingið og amtmaðurin skriva út eina lóg, kundgørelse nr. 11 af 31. marts 1948 af lov om Færøernes Hjemmestyre, har lóggávu- og fyrisitingarvaldið í einum parti av samfelagsins málsøkjum, nevniliga felagsmálsøkjunum, verða løgd til danskar myndugleikar at lóggeva og fyrisita.

Rættast er tí helst at skilja heimastýrislógina sum eina lóg, sum hvílir á rættarsiðvenju, og at henda rættarsiðvenja heldur fram óbroytt og saman við grundlógini frá 1953.

Fólkatingið og kongur kunnu ikki taka heimastýrislógina av bert fyri sítt egna viðkomandi, við tað at lóggávuheimild Fólkatingsins í Føroyum byggir á kundgørelse nr. 11 af 31. marts 1948 af lov om Færøernes Hjemmestyre, sum býtir lóggávu- og fyrisitingarvaldið í Føroyum sundur millum danskar og føroyskar myndugleikar. Bert tað forum, sum í 1948 førdi inn skipanina, Løgtingið við staðfesting amtmansins, ella teir myndugleikarnir, sum hava fingið heimildirnar sambært heimastýrislógini, kunnu broyta hana. Av hesi niðurstøðu kemur eisini tann avleiðing, at ríkismyndugleikarnir onga eftirlitisheimild hava við teim málsøkjum, sum yvirtikin eru; lóggávu- og fyrisitingarvaldið er endaliga latið Løgtingi og landsstýri.

Sostatt kann gildug broyting av heimastýrislógini bert fara fram, við at nýggj heimastýris- ella sjálvstýrislóg verður samtykt av Løgtinginum og staðfest av løgmanni og kunngjørd eftir føroysku kunngerðarreglunum, og at sama lóg verður samtykt og kunngjørd av Fólkatinginum og staðfest av drotningini og kunngjørd eftir kunngerðarreglunum fyri ríkislógir o.a. í Føroyum.

**Alment um innihaldið í skipanini**

Í heimastýrislógini § 1 stendur, at

*"Føroyar eru sjálvstýrandi tjóð í danska ríkinum samsvarandi hesi lóg. Innan fyri ríkismarkið taka føroyingar við fólkavalda løgtingi sínum og einum av tinginum stovnaðum landastýri ræði yvir føroyskum sermálum sum í hesi lóg ásett."*

Lógin ásetur í § 2, at tey mál, sum sett eru á lista A í lógini, kunnu føroyingar sjálvir gera av at taka yvir lóggávuvald og fyrisiting, sum føroysk sermál sambært § 4, stk. 1, og taka tá eisini á seg tær útreiðslur, sum standast av hesum. Á sama hátt kunnu danir krevja, at málsøki á lista A verða yvirtikin av føroyingum.

Í § 3 er ásett, at tey á lógarinnar lista B nevndu málsøki eftir nærri samráðing kunnu yvirtakast soleiðis, at føroyingar taka yvir málsøki sum frammanfyri umrøtt. Mál, sum ikki eru nevnd á lista A og B, taka danir sær av eftir donsku stýrisskipanarreglunum, tey sonevndu felagsmálini sambært heimastýrislógarinnar § 6, stk. 1, men kunnu eisini leggjast føroyingum at fyrisita sambært § 9.

Tað er heimastýrið, sum eru Løgting og landsstýri, sum føroyinga vegna ger av, um lista A mál skulu yvirtakast, og um samráðingar skulu verða um lista B mál.

Heimastýrislógin veitir ávís avmarkað tjóðskaparrættindi. Í § 10 er ásett, at í danska passi føroyinga kann setast afturat "Dansk" og "Danmark", "Føroyingur" og "Føroyar", og at munur kann vera gjørdur á føroyingum og dønum, tá ið veljast skal til føroyskar stovnar, men at tað á annan hátt ikki kann gerast munur. Í § 11 verður føroyskt viðurkent sum høvuðsmál, men danskt kann á sama hátt verða nýtt í øllum almennum viðurskiftum. Í § 12 verður føroyska flaggið viðurkent sum alment flagg í Føroyum.

**Avmarking í føroyska heimaræðinum**
Føroyska heimaræðið er avmarkað av teimum til eina og hvørja tíð verandi sáttmálaligu og øðrum millumtjóða rættindum og skyldum sambært § 5, stk. 1, og eingin løgtingslóg má sostatt ganga ímóti einum millumtjóða sáttmála, sum bindandi er fyri Føroyar. Avleiðingin av, at gingið verður ímóti galdandi millumtjóða sáttmála, er, at viðkomandi løgtingslóg er ógildug, við tað at farið er út um ta heimild, sum heimastýrislógin gevur at lóggeva, av tí at § 5 beinleiðis sigur, at lóggávurætturin er avmarkaður orsakað av teimum til eina og hvørja tíð verandi sáttmálaligu og øðrum millumtjóða rættindum og skyldum.

**Trætur um málsræði**
Eftir heimastýrislógarinnar § 6, stk. 2, verða trætur millum ríkismyndugleikarnar og heimastýrið um, hvørt eitt mál er sermál ella felagsmál, loystar av eini serligari nevnd, skipað av tveimum limum, valdum av ríkisstjórnini, tveimum valdum av landsstýrinum og trimum hægstarættardómarum. Eru limirnir, valdir av landsstýrinum og ríkisstjórnini, samdir, er málið loyst. Um ikki verður málið avgjørt av hægstarættardómarunum.

Einki stendur um, hvør hevur heimild at leggja spurningar fyri nevndina; helst er tað bert landsstýrið og ríkisstýrið, sum kunnu tað (dómur í Føroya rætti um grindalógina).

## 2.1. Yvirtøkulógin [3]

Yvirtøkulógin er lóg nr. 79 frá 12. mai 2005 um mál og málsøki føroyska myndugleika at yvirtaka. Henda lógin er eitt ískoyti til Heimastýrislógina. Í lógini verður staðfest formliga, at føroyskir myndugleikar kunnu yvirtaka øll mál og málsøki, tó undantikin ávís nevnd málsøki.

Hesi eru:
- Stjórnarskipan danska ríkisins.
- Heimarættur danska ríkisins.
- Hægstirættur danska ríkisins.
- Uttanríkis-, trygdar- og verjupolitikkur.
- Gjaldoyra- og peningapolitikkur.

3 - Teksturin er tikin úr viðmerkingunum til uppskotið til lóg nr. 79 frá 12. mai 2005 um mál og málsøki føroyska myndugleika at yvirtaka og endurgevur sjónarmiðini í uppskotinum.

Við hesi lógini varð skipanin viðvend og víðkað í mun til heimastýrislógina, skilt á tann hátt, at meðan heimastýrislógin beinleiðis nevnir málsøki, ið kunnu verða yvirtikin, nevnir henda lógin nøkur fá málsøki, ið ikki kunnu verða yvirtikin eftir hesi lóg; tað merkir, at lógin beinleiðis heimilar at yvirtaka øll onnur málsøki.

Í mun til heimastýrislógina fevnir Yvirtøkulógin um øll tey trý valdini: lóggávuvaldið, útinnandi valdið og dómsvaldið. Harvið kann føroyska myndugleikaskipanin gerast fullkomnari.

## 2.2. Ræðislógin [4]

Ræðislógin er løgtingslóg nr. 41 frá 10. mai 2006 um ræði á málum og málsøkjum.

Endamálið við lógini er m.a. í eini løgtingslóg greidliga at seta upp, hvørji mál og málsøki eru á føroyskum hondum, og hvørji eru á donskum og at fáa størri greiðu á yvirtøkuivamálum.

Síðan heimastýrislógin fekk gildi í 1948, hevur byrjunarstøðið verið, at øll mál hava verið á donskum hondum, hava føroyingar ikki serstakt yvirtikið økið. Hetta er broytt við ræðislógini, sum vísir, um eitt málsøkið er á føroyskum hondum ella ikki. Framtíðar yvirtøkur verða nú framdar við, at økið, sum ætlast yvirtikið, verður strikað av listanum við broytingarlóg.

Kjakmál um ivamál og um framtíðar málsøki, sum nú ikki eru kend, verða ikki í eins stóran mun. Er kjak, um ávíst málsøki er danskt ella føroyskt, so er byrjanarstøðið, at tað er føroyskt.

Ræðislógin ásetir, at tá ið yvirtikið er, stendur galdandi lóggáva við sbrt. heimastýrislógini § 13, men lógaheimildirnar liggja tá hjá føroyingum. Er heimild ella skylda á yvirtiknum málsøki løgd til danskan myndugleika sambært lóg, liggja tær aftan á eina yvirtøku hjá avvarðandi føroyskum myndugleika.

Yvirtøka av einum málsøki krevur tí í grundregluni ongar lógarbroytingar, men føroyska fyrisitingin má sjálvsagt lagast til broytingina. Yvirtøkurnar kunnu sostatt frá einum politiskum sjónarmiði einans vera ein spurningur um, hvør lóggeva og fyrisita skal – føroyingar ella danir – og ikki til ein spurning um, hvør rættarstandur skal verða á økinum. Tað ber tí til at yvirtaka eitt málsøki við bert at strika eitt av teimum tølum, sum standa í § 1, stk. 2 og onga fylgilóggávu gera annars. Fyritreytin er tó, at samráðst hevur verið frammanundan í teimum førum, yvirtøkulógin krevur tað.

4 - Teksturin er tikin úr viðmerkingunum til uppskotið til løgtingslóg nr. 41 frá 10. mai 2006 um ræði á málum og málsøkjum og endurgevur sjónarmiðini í uppskotinum.

## 2.3. Uttanríkispolitiska heimildarlógin (DFG) [5]

Uttanríkispolitiska heimildarlógin er løgtingslóg nr. 80 frá 14. mai 2005 um altjóðarættarligu sáttmálar Føroya landsstýris at gera. Henda lógin er eisini eitt ískoyti til Heimastýrislógina.

Í heimastýrislógini § 5, stk. 2 er ásett, at Danmarkar kongsríki situr fyri uttanríkismálum Føroya. Í § 5, stk. 1 er ásett, at Føroyar skulu virða altjóðarætt, ið er virkin í landinum. Aftur at nevndu reglum í § 5 í heimastýrislógini koma reglurnar í § 8. Sambært § 8, stk. 4 er ásett, at har um serlig føroysk mál er at røða, kann danski uttanríkisráðharrin, tá ið tað verður ikki hildið vera ósambæriligt við áhugamál Danmarkar kongsríkis, heimila føroyskum sendimonnum at samráðast beinleiðis saman við donsku uttanríkistænastuna, um ynski verður sett fram um tað.

Í mun til § 8 í heimastýrislógini gevur uttanríkispolitiska heimildarlógin hesar víðkaðu heimildir:

1) Føroyar hava av sínum eintingum myndugleika at samráðast við fremmand ríki og millumtjóðafelagsskapir, gera sáttmálar og siga úr gildi sáttmálar við tey viðvíkjandi øllum málsøkjum, ið eru yvirtikin til fulnar, uttan at biðja Danmarkar kongsríki um heimild. Løgmaður undirritar einsamallur altjóðarættarligar sáttmálar ella tann, ið løgmaður gevur fulltrú at undirrita.
2) Føroyar hava av sínum eintingum beinleiðis diplomatiskt samskifti við fremmand ríki og millumtjóðafelagsskapir viðvíkjandi øllum málsøkjum, ið eru yvirtikin til fulnar.
3) Føroyar kunnu hava sendimenn í øllum fremmandum ríkjum og millumtjóðafelagsskapum viðvíkjandi øllum málsøkjum, ið eru yvirtikin til fulnar.
4) Føroyar kunnu í ávísum førum í egnum navni fáa limaskap og atlimaskap í millumtjóðafelagsskapum, tá ið slíkir felagsskapir eftir egnum samtyktum loyva tí, og tá ið tað er í samsvari við stjórnarskipanarligu støðu Føroya.

## 3. Stýrisskipanarlógin [6]

Stýrisskipanarlógin er løgtingslóg nr. 103 frá 26. juli 1994 um stýrisskipan Føroya. Karmurin og heimildin fyri lógina er heimastýrislógin.

Í stýrisskipanarlógini er politiskt tríbýti í Føroyum skipað eftir tí mynstri, sum er í øllum fólkaræðiligum londum á okkara leiðum. Sambært § 1 er lóggávuvaldið hjá Løgtingi og løgmanni. Hetta merkir, at ikki er heimilað við løgtingslóg at leggja lóggávuvald til annan myndugleika ella stovn. Útinnandi valdið er landsstýrið, sum hevur politisku og rættarligu ábyrgdina av hesi fyrisiting. Dømandi valdið er hjá dómstólunum.

Í lógini eru reglur um, hvussu lóggávuvaldið, útinnandi valdið og dómsvaldið virka. Eisini eru reglur í fíggjarviðurskiftum landsins, felagsmál, millumtjóðasáttmálar og kommunurnar.

5 - Teksturin er tikin úr viðmerkingunum til uppskotið til løgtingslóg nr. 80 frá 14. mai 2005 um altjóðarættarligu sáttmálar Føroya landsstýris at gera og endurgevur sjónarmiðini í uppskotinum.
6 - Teksturin er tikin úr Áliti um stýrisskipanarviðurskifti Føroya frá 1994, s. 170-171, og endurgevur sjónarmiðini í álitinum.

Lógin ásetir, at Løgtingið eftir 3 viðgerðir samtykkir løgtingslógir, sum løgmaður staðfestir og kunnger. Løgtingsmenn og landsstýrið hava rætt at leggja lógaruppskot fyri Løgtingið.

Sambært § 57 í stýrisskipanarlógini kann broyting í løgtingslógini bert gerast við, at Løgtingið fyrst samtykkir uppskot til broyting av løgtingslógini, men samtykta løgtingslógaruppskotið verður ikki beinanvegin staðfest av løgmanni. Tað soleiðis samtykta løgtingslógaruppskotið skal eftir næsta val verða samtykt óbroytt í fyrstu setu nývalda tingsins og kann síðan verða staðfest á vanligan hátt av løgmanni. Verður heimastýrislógin broytt, kunnu uppskot um at broyta hesa løgtingslóg orsakað av broytingini í heimastýrislógini verða samtykt og staðfest eftir vanligum reglum.

## 4. Evropeiski Mannarættindasáttmálin[7]

Mannarættindasáttmálin er settur í gildi fyri Føroyar við anordning nr. 136 af 25. februar 2000 om ikrafttræden for Færøerne af lov om Den Europæiske Menneskerettighedskonvention.

Mannarættindasáttmálin hevur til endamáls at verja borgarar í teimum evropeisku londunum ímóti mannarættindabrotum. Sáttmálin varð samtyktur í Evroparáðnum í 1950 við íblástri frá heimsyvirlýsingini hjá ST.

Mannarættindasáttmálin er settur í gildi í Føroyum við lóg hin 1. mai 2000, og tí kunnu dómstólar í Føroyum døma eftir sáttmálanum.

Ein røð av ískoytissáttmálum er løgd aftur at sáttmálanum gjøgnum árini. Ískoytissáttmáli nr. 1, 4, 6 og 7 eru settir í gildi við lóg í Føroyum. Hinir eru ikki settir í gildi við lóg, men føroysk lóggáva er broytt samsvarandi, har tað hevur verið neyðugt, so hon er í samsvari við ásetingarnar í ískoytissáttmálunum.

Evropeiski Mannarættindadómstólurin var stovnaður í 1959. Endamálið við dómstólinum er at tryggja, at limalondini halda ásetingarnar í sáttmálanum. Borgarar og stjórnir kunnu tí klaga, um tey halda seg hava verið fyri mannarættindabrotum. Hetta er størsti munurin á evropeiska mannarættindasáttmálanum og ST-mannarættindasáttmálunum, tí teir hava bert nevndir, ið hava eftirlit við, um limalondini halda ásetingarnar í sáttmálunum.

Til ber eisini at leggja mál fyri evropeiska mannarættindadómstólin, men hetta kann ikki gerast, fyrr enn allir møguleikar eru troyttir í heimlandinum.

7 - Teksturin er tikin av heimasíðuni hjá Uttanríkis- og vinnumálaráðnum.